

Frá vinstru standa Hjørdis Johansen, Majfríð Jacobsen, Birita Ludvíksdóttir Poulsen, Hansina Iversen og Maria Guttesen. Tvíburarnir Eyð og Unn vanta tíverri á myndini
Mynd: Ólavur Frederiksen

# Hjørdis og genturnar: Fyrstu ferð á palli eftir 28 ár

**Tað var ein søguligur dagur á spæliplássinum í Gøtu, tá Hjørdis og genturnar fóru á pall fyri fyrstu ferð, síðan plátan kom út fyri 28 árum síðani. Og tað var eisini eitt come-back, sum vildi nakað**

BARNASANGIR Á G!
Stefan í Skorini
stefan@sosialurin.fo

Spæliplássið var so at siga fult við fólki, tá Hjørdis og genturnar trinu á pall fyri fyrstu ferð nakrantíð - børn og foreldur, sum sjálv vóru børn, tá hendan eftirhondini legendariska plátan varð givin út.

Bimbambussa og sangurin um tey tíggju indianarabørnini, hevur verið ein partur av føroyska sangskattinum í nógv ár, og tað sást eisini aftur á áhoyrarafjøldini, at hetta var eitt av hæddarpunktunum á festivalinum.

Fólk bæði sungu og klappaðu eins og "genturnar" á pallinum. Barnið kom sanniliga í okkum vaksnu aftur, sum mintust aftur á tey sorgleysu barndómsárini, tá Hjørdis við síni gjøgnumtrongjandi rødd og hennara gentur plagdu at gera okkum dagin eitt sindur lættari.

## Men hví skuldu vit bíða so leingi?

Hetta var tann stóri spurningurin, eg hevði sett mær fyri at spyrja Hjørdis, tá hon sum ein onnur stjørna traðkaði av aftur pallinum.

- Man brúkti ikki sovrit tá. Tað var ikki vanligt at skipa fyri slíkum konsertum tá í tíðini, sigur Hjørdis Johansen, ið stóð fyri útgávuni frá 1977.

Tá plátan varð útgivin vóru ongar myndir av gentunum á húsanum, og tær spældu sum sagt onga konsert fyri almenninginum.

Tær stóðu allar á gáttini til pubertetin, og tí helt Hjørdis tað vera skilagott at verja tær við ikki at lata tær koma í ov nógv fram í fjølmiðlunum.

Sangirnir á plátuni vórðu spældir í kvøðuljómunum í fleiri harrans ár, og tað kemur enn fyri, at vit hoyra onkran teirra spældan í útvarpi. Og tey flestu munnu kennast við løgini og tekstirnar á hesi útgávuni.

- Hatta er ein vanskeligur aldur, og tað er ikki vist, at tær høvdu verið so glaðar fyri, at myndir av teimum vóru at finna í hvørjum húsi í landinum, sigur Hjørdis.

Vit kunnu bara staðfesta, at tíðirnar eru broyttar. Nú á døgum verða sangarar og tónleikarar ofta fotograferaðir úr øllum hugsandi vinklum, og myndirnar prentaðar í fløguhúsum.

- Vit vildu ikki dyrka myndirnar og tað visuella, men heldur tann glaða sangin, vísir Hjørdis á.

## Maria var tað størsta barnið

Tann einasta av genturnum, sum hevur havt tónleikin til sítt livibreyð seinni í tíðini er Maria Guttesen, sum var kapelmeistari hendan dagin. Hon hevði eisini arrangerað øll løgini.

Tað var eisini heilt týðuligt, at hon var tann, ið var mest von við at standa á palli. Hon tosaði við Hjørdis við eini fittari barnarødd og prátaði millum sangirnar, sum var hon framvegis 8-10 ára gomul. Hetta gjørdi eisini framførsluna nógv festligari. Bert harmiligt, at Maria varð goymd aftanfyri eitt ljómborð tað mesta av tíðini.

- Hesir sangirnir eru vorðnir ein føroyskur sangskattur eftirhondini, og tí eru tað stuttligt at framføra teir live saman við hinum gentunum, sigur Maria Guttesen, sum spældi allan tónleikin inn á fløgu og sendi hinum gentunum, so at tær kundu venja áðrenn tær møttust við bólkinum til venjingar.

Genturnar og tónleikabólkurin vandu hvønn dag í eina heila viku áðrenn framførsluna. Sigast skal at fyri tað óvandað oyra ljóðaði tónleikurin at vera væl og professionelt úr hondum greiddur av dugnaligum tónleikarum.

- Eg hevði als ikki roknað við, at fyriskipararnir fóru at biðja okkum um at spæla aftur, men sangirnir eru vorðnir eru partur av tí føroyska sangskattinum, og tí var tað rættiliga upplagt at biðja okkum um at spæla saman aftur, segði Maria Guttesen.

Tað var Annlis Bjarkhamar, ið setti seg í samband við tær um eina framførslu á G! festivalinum.

Gingu allar í flokki saman

Allar seks genturnar hava gingið í flokki saman í samfull tíggju ár í fólkaskúlanum, men tær hava ongantíð allar verið savnaðar aftur síðani.

Tað var Jóannes Nolsøe, ið var lærari í Tórshavnar Kommunuskúla, sum vísti á hesar genturnar, tá Hjørdis hevði heitt á hann um at finna nakrar dugnaligar sangarar í teimum lægru flokkunum.

Tað var sostatt upphavið til eina tað mest fólkakæru føroysku plátuna við tí væl kenda fílinum á permuni. Tónleikurin varð endurútgivin fyri nøkrum árum síðani á fløgu, og tann fløgan hevur selt væl.

# Majfríð Jacobsen: Eg gjørdist heilt kløkk

Tónleikur
Stefan í Skorini
stefan@sosialurin.fo

- Eg bleiv heilt kløkk, tá eg hoyrdi, at vit skuldu spæla á G! festivalinum. Eg helt heilt einfalt, at tað var ein joke. Men hetta var sera stuttligt at royna segði Majfríð Jacobsen, ið er ein av gentunum hjá Hjørdis.

Hon leggur afturat, at meðan tað hevur verið stuttligt at venja saman við gentunum aftur, hevur tað samstundis eisini verið tíðarkrevjandi.

- Eg havi ikki sungið nakað serligt, síðani vit góvu hasa plátuna út, men eg havi sungið eitt sindur í kóri, sigur Majfríð um hennara tónleikaliga virksemi síðani plátuna.

Men hvussu var tað hjá einari 10-11 ára gamlari gentu at vera við á eini útgávu, ið var so væl móttikin.

- Tá hildu vit sjálvandi, at tað var ordiliga spennandi at vera við á einari plátu, sigur Majfríð, tá vit spyrja hana, hvussu hon upplivdi at vera við á útgávuni sum 10-11 ára gomul genta í Havn.

# Birita Ludvíksdóttir Poulsen: Eg fekk láturkrampa

TÓNLEIKUR
Stefan í Skorini
stefan@sosialurin.fo

- Jú for sørin, eg bleiv ordiliga yvirraskað, tá eg fekk at vita, at vit skuldu syngja á festivalinum, sigur Birita Ludvíksdóttir Poulsen.

- Eg var stødd niðri í Danmark, tá eg fekk boðini, og eg og ein vinkona hjá mær fingu láturkrampa, tá vit hoyrdu tað, sigur Birita, tá vit fingu orðið á hana til eitt stutt prát aftaná framførsluna.

- Fyrst helt eg, at tað var ordiliga stuttligt, men so bleiv tað meira alvorligt, tá vit fóru at venja. So eg var faktiskt rættiliga nervøs undan konsertini, sigur Birita Ludvíksdóttir Poulsen.

- Fólk vóru glað og sungu við á øllum sangunum. So tað var ordiliga cool, sigur ein sera fegin Birita eftir framførsluna á spæliplássinum í Syðrugøtu.

Hon minnist aftur á tíðina, tá plátan kom út í Føroyum, og gjørdist ein tann størsta landaplágan, menn vita um at siga.

- Vit vóru rættiliga anonymar, tí tað vóru ongar myndir av okkum á plátuni, sigur Birita. Tær vórðu tískil ikki steðgaðar á gøtuni av fólki, ið vildu heilsa uppá tær og hava tær at skriva ein autograf á plátuhúsan tá í sjeytiárunum. Men kanska tað fer at broytast nú.

# 200 er tað coolasta



**Fríggjakvøld kl.23.24**

-Tað besta er Limp Bizkit og Eminem ella meinar tú bara bólkarnir her á festivalinum?. Á festivalinum er tað 200, sum vit gleða okkum mest til. Teir eru ordiliga coolir.

8 ára gamli Hallur úr Klaksvík og 9 ára gamli Bogi úr Havn eru rørandi samdir, tá vit spyrja teir á Gøtusandi, hvør besti tónleikabólkurin er á G! Festivalinum.

-Her er ordiliga stuttligt at vera. Her er góður tónleikur, og tað er eisini mega stuttligt at vera á spæliplássinum, siga teir báðir vinmenninir.

Hóast klokkan nærkast midnátt fríggjakvøldið eru hvørki Hallur ella Bogi troyttir. Teir báðir ætla at vera leingi uppi í kvøld.

-Vit fara í hvussu er at vera uppi til klokkan tvey ella trý í nátt. Rekordin hjá okkum at vera uppi er til klokkan fýra um náttina, so vit klára at vera uppi leingi afturat, siga teir avgjørdir.

.páll